Blaðið eigur ein at vissa sær á posthúsinum.

SOSIALURIN

FRÆLSI JAVNAÐUR BRØÐRALAG

NR. 12
MIKUDAGIN
12. FEBRUAR 1964
37. ÁRG.

Royndarskip

Eitt krypuluppskot frá Erlendi Paturssyni landsstýrisins vegna um 30 tonsa bát til royndarskip

Seinasta landsstýri hevði fingið til vega fullfiggja uppskot til royndar-, bjargingar- og vaktarskip. Var bara eftiri at gera tánkroynd fyri at vita, hvussu stór maskinan skuldi verða fyri at skipið kundi sigla 16 mil. Men so kom hetta landsstýri og legði alt bakk tað fyrsta ári. Úrslitið er, at vit ikki eru enn farin undir at gera nakað skip, hvorki royndarskip ella bjargingarskip ella vaktarskip.

Jú, tað er komið burtur úr hesari bakklegging, at maðurin, ið reypar sær at sita við teirri »hulu hond«, sum alt landsstýrið má sprakla í, kundi siga við sínar fógvadansarar, at teir kundu — og sjálvandi skuldu — fáa skip sitt »Vikingin« istaðin fyri trol- og linuskipið »Viðoynna«. »Víkingur« skiparin hevði sagt upp og skipið lá jú har. Hann vildi offra seg fyri fosturlandið, so tað, ið hann skuldi hava afturfyri skuldi verða lítið og lætt, fekk hann renturnar av skipsins kostnaði og so aftrat rikiliga avdráttin og rikiliga avskrivingina í reinvinnu, var hann nøgdur.

EITT ÓFØRT BRAGD teir gjørdu landinum og landskassanum og Kjartani! Hvat siga renturnar! Hvát sigur avdrátturin! Hvat sigur avskrivingin! Renturnar eru tær ikki 6 %? Ella 7? Avdrátturin 10 %? Og avskrivingin 10 ella 5%?

Hvør dugir at rokna? Hann, ið dugir, takið blýantin! Sendi facittið til blaðið! 10 kr. ella 10 oyru, tað, ið 14. September ella Erlendur Paturssonur segði, at Arup átti at byggja eitt 12,5 miljóna virki fyri, fæst í finningar ella gittingar ella kollrokningarlon!! Vit kunnu so meta hesa leiguna við leiguna av »Viðoynna«. Munur á skipana rokt av uppgávuni, vilja menn halda, var eingin. So var sildatiðin úti og harvið uppgávan lokin og leigan út!.

Nei, segði hann »med den hule hånd«. Tað halda út, at eg gangi við til at lata nakrar mánaðar imillum við ongari rentu, ongum avdrátti og ongari avskrift.

Nei, minir spraklimenn! Soleiðis spæla vit ikki! Og tá varð nýggjur sáttmáli skrivaður: full renta, fullur avdráttur og full avskriving eisini fyri ta tíðina, ið ikki er brúk fyri skipinum. »Tað er tað minsta. Minir sprellumenn! Teir eru óførir, óføra hampuligir møtimær. Og tað skal aldri henda, at so leingi teir eru hampaligir, at Dammurin skal fáa sprongt ketuna. Men Gud náði teir, um teir ikki sprakla, sum eg vil hava teir at sprakla.

— — —

Niels Holm Jacobsen helt tað vera dáragerð at fara at keypa eitt 30 tonsa royndarskip. Tað kundi einans royna nær landi. Tað var ikki har, vit skuldu royna. Tað

(Framhald á 2. síðu).

1200 kr. í minstuløn

TJØÐVELDIÐ ÍMOTI VIÐ FYRSTU VIÐGERÐ

Sama tilfelli við uppskoti javnaðarmanna um at hækka inntøkumarkið fyrst at fáa saltfiskaprisviðbót frá 2500 kr. til 3500 kr. og hækka pristilskot fyri millumfisk og smáfisk, ið var atvikavist var 20 oyru og 5 oyru kg, til 40 oyru kg tikið undir einum. Her vóru serliga Jóhan Símonsen og Erlendur Patursson ímóti, men lógdu í øði við briksli á javnaðarmenn, sum komu við hesum máli.

6 psk. í fritíðarlón til útróðramenn fekk heldur ikki stórvegis aðra viðgerð frá tjóðveldismonnum enn briksl. Tað sær so út soleiðis sum, at tjóðveldismenn hava tikið tað støðu, at teir skulu vera ímóti, bara tað ber royk av javnaðarmanna hondum — so langt eru teir soknir í fovningin á afturhaldinum ti svartasta í heiminum.

HVÍLDARHEIMIÐ verður opnað aftur

Landsstýrið mælir donsku ríkisstjórnini til at broyta lóg um hvíldarheim í Danmark, sum nú er til viðgerðar á Fólkatinginum — eisini at galda í Føroyum.

Hvíldarheimið NAINA, sum seinasta árið hevur verið afturlatið verður væntandi opnað aftur — mál framlagt á tingborð hesum viðvíkjandi.

Tað hevur staðist nógv tos av at hvíldarheimið »Naina«, hevur verið stongd í langa tíð. Tað eru figgjarligir trupulleikar, sum hava forðað fyri dagliga rakstrinum. Og so stórir hava hesir trupulleikar verið, at stjórnin fyri heimið hevur læst.

Vit hava fingið at vita, at undirskotið hevur verið so mikið stórt, at tað var vónleyst at halda fram.

Hvíldarheimið hevur verið ríkið fyri studning og pening innkomin við basari, umframt tann pening, sum sjúklingarnir, ið har hava verið, hava goldið.

Tað verður sagt, at raksturin hevði borið seg, hevði heimið alla tíðina verið fullsett, men so hevur ikki verið. Har hevur verið tómligt oftast.

Tað tykir okkum løgið, at so skal vera, tí einki annað er at hoyra, enn at plásstroð er á sjúkrahúsum, á øllum deildunum, so at tað er væl litið annað at hugsa sær, enn at lítið og vánaligt samarbeiði hevur verið.

Nú leggur so landsstýrið fram uppskot hareftir løgtingið kemur at bera meginpartin av útreiðslunum til hvíldarheimið. **Og eftir umbon frá landsstýrinum, man danska ríkisstjórnin fara at broyta lóg um hvíldarheim í Danmark, sum í lotuni er til viðgerðar í Fólkatinginum, til eisini at galda fyri Føroyar.**

Sostatt skuldi raksturin verið tryggjaður í hvíldarheiminum fyri framtíðina.

EISINI SMÁBYGDIRNAR

Í málinum um nevnd at áseta ráfiskaprísin, setti javnaðarflokkurin fram soljóðandi uppiskoytisuppskot:

Landsstýrið verður heimilað úr landskassanum at rinda eykaútreiðslur, — í herundir møguligt eykapristilskot — ið standast av tí undir uppskoti til samtyktar í hesum máli nevndu skipan fyri at fiskimenn og fiskimannasamtøkur á plássum, har fiskur ikki verður keyptur, kunnu sleppa av við fiskin á plássinum og fáa fyri fisk sín prísin, ið ráfiskaprisnevndin ásetur.

Uppskot
til
samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at vera fiskimonnum og fiskimannasamtøkum á plássum har, ið fiskur ikki verður keyptur, til hjálpar at fáa í lag skipan, sum tryggjar teimum at sleppa av við fiskin á plássinum fyri prísin, sum verður ásettur av ráfiskaprisnevndini.

Í viðmerkingunum sigur flokkurin:

Sum monnum kunnugt eru ikki fá pláss, har ið fiskur ikki verður keyptur út um til heimabrúks. Hetta er fiskimonnum á hesum plássum so ringur meinbogi, at mangir hava eínki annað havt til ráða at taka enn at flyta til annað pláss, har ið livíligari er.

Undir hesum umstøðum má tað haldast at vera beint og neyðugt, at landsstýrið tekur sær av hesum misslagi í samfelagi okkara og hjálpir monnum at fáa í lag skipan, sum tryggjar øllum avbyggdamonnum, ið eru so illa fyri, sum her norðið við, at sleppa av við útróðrabátafisk á plássinum fyri tann prís, sum ráfiskaprisnevndin ásetur.

75 ár

Martina Wintereik, Skopun.

Trú og vónin reist og rond,
tá lagnan var tær beisk og vond,
so ongatíð tú gavst á hond
— og nú er vár í nánd.

Vinarlig heilsan
Hans Dalsgaard.

ÚR LØGTINGINUM

Ráfiskaprísurin og annað tílíkt mál á tingi

Sum mong enn minnast, kom frá arbeiðarum, fiskimonnum og útróðrarmonnum til landsstýrið um at lata løgtingið koma saman í heyst.

At eg sigi fiskimenn og útróðrarmenn kemur av tí, at bæði skips- og bátafiskimenn kravdu tingið saman, tí skipsmenn sluppu ikki til Esbjerg við veiðuni, har prísurin var hægstur, og útróðrarmenn í mongum bygdum sluppu als ikki av við fisk, og í øðrum bygdum noyddust menn at selja til lægri prís, enn nevndin hevði ásett.

Sjálvandi styðjaði Føroya javnaðarflokkur hesi krøv fiskimanna, hesi rættvísu krøv. Samstundis varð landingarprísurin í Føroyum lækkaður frá 132 til 122 stp. fyri tonsið. Í menn fingu bíligan fisk, sum teir selja fyri høgan prís. Landsstýrið helt hetta vera í lagi.

Í núverandi tingsetu hava fleiri harðir dystir verið um hesi viðurskifti, og enn halda landsstýrismenn og teirra flokkar, at alt er í lagi. Í mannavaldið hevur buktina og báðar endarnar í Føroyum í okkara døgum. Hetta er harmiligt aftaná, at vit javnaðarmenn í 40 ár hava skrivað og talað um hin harða kapitalistahælin, sum trámpar omaná hini kúgaðu fjøldini, og vist á, at einans ein bjarging er fyri fjøldina, og tað er at fylkjast um javnaðarflokkin. Harmiligt, at fólk soleiðis lótu seg villleiða, at tey lótu yvirklassan fáa buktina og báðar endarnar.

Mál er á tingi, sum eitur »Ráfiskaprísurin«. Uppskot landsstýrisins loysir ikki málið, tí tað sigur bert, at nevnd verður vald á sama hátt sum síðsta heyst, og henda nevnd skal áseta prís eins og áður.

(Framhald á 4. síðu)

Hækkerup flytur markið út 12. mars

Enski uttanríkismálaráðharrin Riohard Butler hevur verið í Keypmannahavn í sambandi við útflytingina av fiskimarkinum við Føroyar.

Samráðingar vóru millum Butler og Per Hækkerup uttanríkismálaráðharra viðvíkjandi fiskimarksspurninginum. Hækkerup hevur aftaná samtalurnar við Butler ságt, at danska støðan í fiskimarksmálinum er óbroytt, fiskimarkið verður útflutt 12. mars

Tað er líkt til, at enska stjórnin vil royna at fáa fiskimarksspurningin skotnan út nakað enn og man tað ikki í minsta mun hava samband við parlamentsvalið, ið verða skal í heyst.

TEIR MONGU LÆRARAR Í JAVNAÐARFLOKKINUM

Hesar reglur vóru týsdagin at lesa í Dagblaðnum:


Og teir mongu lærarar, sum styðja javnaðarflokkin skulu vita tað, at eru teirra menn ímóti, at lærararnir fáa styttri arbeiðstíð og harav størri timalon, so fáa teir tað heldur ikki við hjálp av núverandi landsstýrissamgongu.

Hvør skal siga? —

Kanaltunnell millum Bretland og Frakland

Millum Bretland og Frakland skal nú gerast vegasamband. Nógv hevur verið talað um koyrisamband millum hesi lond tvørturum Ermasund. Nú siga báðar stjórnirnar frá, at spurningurin um bygging av eini tunnell undir sjónum verður umhugsaður, og tað kann tí væl vera, at tunnell millum londini verður um nøkur ár.

Higartil meta menn, at kanaltunnellin kemur at kosta um 3 milliardir krónur. Hon verður 51 km til longdar og kemur at liggja 36 km undir sjónum.



Seinasta leygardag og sunnudag, vórðu Føroyameistaraheitini í borð tennis fyri menn I. leikað í Havn, og vóru tað í felags, single og double. Í felagsmeistaraskapinum vórðu úrslitini hesi:

Kyndil — Glæman Klakksv.	6—4
TBF, Tvøroyri—E. B. Eiði	10—0
B36 Havn—Framm Klakksv.	8—2
Kyndil Havn—B36 Havn	9—1
TBF, Tvøroyri—Roynd Havn	8—1

Finala

Kyndil, Havn—TBF, Tvør.	8—2

Í single gjørdist Poul Michelsen úr Kyndli meistari har hann í finaluni vann á Eirik Jensen í einum góðum dysti við 21—13, 20—22, og 21—18.

Annars var tann besti leikur í semifinaluni har í Poul Michelsen vann á Árna Dahl úr Glæmuni Klakksvík. Hesin dystur man verða tann best spældi og mest spennandi dystur ið sýndur hevur verið í Havn. Poul vann eisini henda dyst ín í trimum settum 18—21, 21—17 21—18.

Í doublekappingini fór B36 við heitinum har teir í finaluni vunnu á (Rudolf Niclasen—Kári Helmsdal) (Sverri Mdjord—Eirikur Jensen úr TBF Tvøroyri) við 21—18, 21—19. Hesin dystur var eisini vælleiktur.

Vert er at leggja til merkis at TBF bleiv nr. 2 í bæði sigle, double og felagsmeistaraskapinum.

Komandi leygardag sunnudag verða Føroyameistaraskapini flytt til Tvøroyri.